

# Søgan um Rudolf



©www.printland.dk

Tað var einaferð eitt gamalt reindjór, sum æt Rudolf.

Alt lívið hevði hann verið argaður, tí hann hevði reyða nøs sum lýsti.

Hini reindjórini høvdu ikki reyða nøs, tí argaðu tey hann.

Gamli Rudolf búði í skógini – undir eini brúgv.

Her sat hann og gjørdi øllum fortreð sum ætlaðu sær yvir um brúnna.





©www.printland.dk

Hesa brúnna skuldu nissurnar yvirum

tá ið tær skuldu geva jólamanninum jólagávurnar, sum tær høvdu gjørt.

Nissurnar vistu at eitt gamalt reindjór, sum var í ringum lag, búði undir brúnni

Og tær høvdu hoyrt tað siga, at tað ætlaði at taka allar jólagávurnar

Men nissurnar løgdu eina ætlan

Tær ætlaðu at lumpa Rudolf



©www.printland.dk

Fyrst fór tann lítla nissan við tí lítlu gávuni yvirum

**Trip trap trip trap**

Rudolf, sum stóð undir brúnni og bíðaði, segði

“Hvør trampar á míni brúgv?”

“ Tað eri eg, lítla nissa, eg skal yvir til jólamannin við eini gávu”

Segði tann lítla nissan

“Gev mær gávuna elle stangi eg teg!”Rópti Rudolf

“Bíða heldur til miðlinga nissan kemur,

hennara gáva er nógv størri enn mín!” svaraði tann lítla nissan.

“Í lagi” segði Rudolf, “far so ”



©www.printland.dk

So fór miðlinga nissan við sínari gávu yvir um brúnna

**Trip Trap Trip Trap**

Rudolf, sum bíðaði spentur undir brúnni, físti

“Hvør trampar á míni brúgv?”

“ Tað eri eg, miðlinga nissa, eg skal yvir til jólamannin við eini gávu”

Segði miðlinga nissan

“Gev mær gávuna ella stangi eg teg!”Rópti Rudolf hart

“Bíða heldur til tann stóra nissan kemur,

hennara gáva er nógv størri enn mín!” svaraði miðlinga nissan.

Rudolf hugsaði eina løtu, og segði so

“Í lagi far so ”



©www.printland.dk

Nú kemur tann stóra nissan, hon má skumpa gávuna frammanfyri sær, tí hon er so stór **Trip trap skumpa trip trap skumpa**

Rudolf sum stendur undir brúnni er sera spentur, hann skríggjar:
“Hvør trampar á míni brúgv?”

“ Tað eri eg, stóra nissa, eg skal yvir til jólamannin við eini gávu” Segði stóra nissan

“Gev mær gávuna elle stangi eg teg!” skríggjaði Rudolf
“ Um tú bíðar eina løtu, kemur tann allar allar allar størsta nissan, við tí allar allar allar størstu gávuni” Svaraði tann stóra nissan

Ikki er neyðugt hjá Rudolf at hugsa leingi áðrenn hann spentur svaraði:
“Í lagi far so ”



©www.printland.dk

Nú vóru allar nissurnar komnar yvir um brúnna, tær flentu hart

Tær høvdu júst lumpa reindjórið



©www.printland.dk

Rudolf sat nú undir brúnni

Og bíðaði..........

Og bíðaði..........

Og bíðaði..........

Og bíðaði..........











©www.printland.dk

Tá ið hann varnaðist at fleiri nissur ikki komu

Varð hann so keddur

At hann byrjaði at gráta

Hart

og harðari.........

## og harðari........

# og harðari.......



©www.printland.dk

So fóru nissurnar heim til jólamannin,

og góvu honum gávurnar

Jólamaðurin varð ógvuliga glaður, men spurdi undrandi:

“Hvør er tað, sum grætur so hart?”

Nissurnar fortaldu fyri jólamanninum um reindjórið, sum var undir brúnni

og ætlaði at taka allar gávurnar,

tær fortaldu eisini hvussu tær høvdu lumpa tað.



©www.printland.dk

Jólamaðurin tókti so synd í reindjórinum, at hann fór at vitja tað
“Jamen hví situr tú her og grætur?” spurdi jólamaðurin

“Tí nissurnar lumpaðu meg!” Svaraði reindjórið
“Tað er eingin, sum er góður við, tí nøsin hjá mær lýsur!”

Jólamaðurin hugsaði seg um og segði:
“ Fitti, fitti Rudolf, tú skalt slettis ikki vera so keddur....., HO HO tí mær tørvar teg, tú kanst hjálpa mær at finna veg, tá ið eg skal flúgva við sletuni og deila pakkar út til børnini. Vilt tú tað?”



©www.printland.dk

"JA JA JUBIII...."

Svaraði Rudolf glaður

"men eg dugi ikki at flúgva"





©www.printland.dk

Jólamaðurin flenti

**HO HO HOO**

“ so er gott at eg dugi gand”

Jólamaðurin spenti nú Rudolf framman fyri sletuna

Stroyddi jólastøv á hann...

Og saman flugu teir út í heim við jólagávum til børnini.



©www.printland.dk